Landssjúkrahúsið




# Koloskopi

## Kikarakanning av langanum

**Hvat er ein koloskopi?**

Koloskopi er ein kikarakanning av langanum. Læknin, sum ger kanningina, sær tarmrovuna og um broytingar eru. Ígjøgnum eina kanal í kikaranum, ber til at taka vevna frá til kanningar.

**Fyrireikingar til kanningina**

Tað er umráðandi, at tarmurin er væl tømdur, so tarmrovan sæst so væl til ber.

Tú skal keypa Picoprep, sum fæst í hondkeyp á Apotekinum og fylgja vegleiðingini í hesum faldara á aftastu síðu.

Beint undan kanningini verður ein nál løgd í eina æðr í arminum, so tað er møguleiki at geva doyvandi og pínustillandi heilivág.

**Heilivágur**

Um tú tekur heilivág, skalt tú taka hetta sum vanligt. Tekur tú jarntablettir, skal tú gevast við hesum 4 dagar áðrenn tú byrjar við tømingini.



Hevur tú insulinkrevjandi sukursjúku, ella tekur blóðtynnandi heilivág, skalt tú seta teg í samband við okkum.

**Kanningin**

Sjálv kanningin tekur ½-1 tíma.

Tú verður lagdur á eina legu, á vinstru lið.

Ein slanga (uml. á tjúkd við tummilin) verður førd inn í baktarmin og upp í langan.

Fyri at síggja tarmrovuna verður luft blást inn í tarmin undir kanningini. Hetta kann spenna, pressa og geva magapínu.

**Fyrireiking til kanning av langanum (koloskopi)**
Tømingin ger, at tú fært diarré (kann virka innan 3 tímar). Tú kanst fáa vaml og høvuðpínu av tømingini.

**Tveir dagar undan kanningina** skalt tú taka 2 tbl dulcolax kl 12.00 og kl 22.00 — er pakkað saman við Picoprep. Et ikki grovt breyð, ella frukt við kjarnum, annars vanligan kost. Drekk ríkiligt, 2-3 litrar um døgnið. (Vatn, saft, juice, te og kaffi)

**Dagin fyri kanningina**, skalt tú ikki eta fasta føði, ella drekka mjólkarúrdráttir. Tú kanst fáa tunnar vætur sum eru: (Aspargessuppa o.l. uttan fyllu, saft/juice, uttan fyllu, sodavatn, vatn, te og kaffi)

**Tað er av týdningi, at tú drekkur ríkiligt allan dagin, gjarna søtar vætur (ikki light/sukurfrítt). Er eisini galdandi fyri tey, ið hava diabetes.**

**Kl 15.00:**
-Fyll eitt glas við køldum vatni
-Koyr annað brævið av Picoprep í
-Rør blandingina í 2-3 min. Tá tað ikki brúsar, er blandingin liðug.
Blandingin er ráhvít/óklár og gerst lunkað. **Drekk hetta innan 15 min.** Tað er týdningarmikið, at drekka ríkiligt, minst 1 litur, innan fáar tímar, aftaná hvørt brævið av picoprep.

**Kl 21.00**: Blanda næsta brævið av Picoprep á sama hátt, sum kl 15.00 , sí omanfyri.

Drekk ríkiligt, eisini kanningardagin.

**Kanningardagin (2 tímar undan kanningini)** skalt tú eta eina breyðflís, gjarna við páleggi og ein te/kaffimunn. **<u>Hetta er ikki galdandi um tú skal til gastroskopi sama dag, tí tá skal tú fasta 4 tímar.</u>**

Tú kanst verða plágaður av luft í tarmunum, restina av degnum.

Av tí, at tað ymiskt, hvussu leingi kanningin varar, kann tað verða bíðitíð.

Eftir kanningina.

Læknin kann beinanvegin siga tær, hvat hann hevur sæð. Er vevnaður tikin frá til kanningar, ganga 1-2. vikur, til svarið er komið. Avtalað verður, hvussu tú fært úrslitið.

**Hevur tú fingið doyvandi heilivág, mást tú ikki koyra bil restina av degnum. Heilivágurin ger eisini tað, at tú møguliga, ikki minnist alt frá kanningini.**

Fært tú sterka magapínu, varnast blóð í opningi ella fríofficial blóð frá baktarminum, skal tú venda tær til skaðastovuna.

**Sig frá**

Um tú ikki kanst møta ásettu tíð, verður tú vinarliga biðin um, at ringja á tel. 30 45 00, lokal 5203 millum kl. 14.00-15.00 gerandisdagar.

Dagført: september 2019

Landssjúkrahúsið

Endoskopieindin

tel 304500 ww.ls.fo